# jargingarlið







*Bara ein lækni var í tunilinum, hóast tvey vanlukkustøð vóru. Marjus Dam, kommunulækni í Vágum hugdi at teimum skaddu og gav boð um at senda tey á sjúkrahús*

bussinum. Tær vóru púra skelkaðar og ætlaðu at hjálpa fast kleimndu fólkunum í bilunum, men ein sløkkiliðsmaður royndi at sissa og fekk tær burtur frá staðnum.

Á vanlukkustaðnum tykist alt vera nokkso ruðuleikakent. Fólk renna aftur og fram, og eingin leiðari sæst. Summir menn standa bara upp og niður.

Vit spyrja, hvar leiðslan er, og fáa at vita, at leiðararnir standa úti við munnarnar. Vit spyrja nærri, um eingin leiðari er á staðnum. Løtu seinni fáa vit svarið, at tað er hasin maðurin. Hann hevur einki frámerki, men vestmenningar og kvívíkingarar kenna hann helst og vita, at hann er liðleiðari.

So byrjaði teir at bera skadd fólk úr bussinum í sjúkrabilar, sum síðan fóru furandi avstað suður á Landssjúkrahúsið við teimum.

Síðani varð farið undir at skera bilarnar við fast kleimdu fólkunum í upp. Tað tók heilt langa tíð, men ein fyriskipari lýddi mær í oyrað, at tað hevði sína orsøk. Hesin partur av venjingini var eisini fyri at læra fleiri sløkkiliðsfólk at skera.

Sløkkiliðsfólk og ikki sjúkraflutningsfólk lyftu tey skaddu í bilunum yvir á børur.

19.58 sat ein kvinna framvegis føst í einum bili.

## Eingin kreppuhjálp

Tað tókst eitt sindur løgið, at eingin fór inn í bussin at taka sær eitt sindur av teimum skelkaðu fólkunum í bussinum. Sagt verður annars, at tann umsorganin hevur ómetaliga nógv at siga.

Vit fara yvir til hitt vanlukkustaðið, og har stendur kommunulæknin Marjus Dam og hevur yvirlitið yvir, hvussu nógv fólk eru skadd, og hvussu nógv eru álvarsliga skadd.

Hann sigur, at uttan fyri stendur tyrlan klár at flyta fólk suður á Landssjúkrahúsið.

Løtu seinni frætta vit, at tá ið sjúkrabilurin kemur út við fólki til tyrluna, er eingin tyrla. Hon var noydd at fara, tí júst tá var ein veruligur sjúkraflutningur til hennara. Av tí sama noyddust sjúkrabilurin at venda og koyrdi so suður til Havnar.





## Ov nógv fólk

Á hesum skaðastaðnum vóru ómetaliga nógv fólk, tí bjargingarfelagið út Vágum var eisini komið. Tveir triðingar av fólkunum høvdu einki at gera á staðnum, stóðu hendur í lumma.

Sum ein fyriskipari tók til.

- Har vóru so nógvir menn, at teir kundu gjørt eitt stórt orkestur.

Tað gongur heldur illa hjá okkum at eygleiða, hvat fer fram á hesum skaðastaðnum, tí ein sløkkiliðsmaður úr Sørvágur kýstaði okkum burtur. Tað plagar annars at vera løgreglan, sum tekur sær av tí uppgávuni. Men har var tá ikki komin nøkur løgregla enn.

20.25 frætta vit, at framvegis er eitt skatt fólk eftir at fáa burtur.

## Tá er politiið komið.

Sjúkrabilarnir vóru nógvir, og vit síggja eisini ein úr Klaksvík. Um hann var við í venjingini ella var í Vágum í øðrum ørindum, visti eingin at siga.

Tað undraði okkum ikki sørt, at bara ein lækni var á staðnum, og hann var á vanlukkustaðnum nærri vágalandinum. Á hinum staðnum, við bussin, var ongantíð nakar lækni.

Aftaná venjingin segði danski konsulenturin Per Teglgaard, at hann helt venjingina vera góða, og hann helt tað vera rætt, at hjálparfólkini vóru tveitt út í hesa stóru uppgávu fyri veruliga at kunna royna seg. Okkurt mundi tó vera at seta fingruin á, og tað kann so gerast betur næstu ferð.

Nú verður so ein frágreiðing skrivað, og hon verður væntandi liðug um tvær ella tríggjar vikur.





